LM-063/2020



BYGGISKRÁ. Februar 2018

SAMBÝLI TIL FÓLK VIÐ MENNINGARTARNI

Sambýli á Mýrini í Tórshavnar kommunu, Matr.nr. 1au, 1aw og 1ax í Hoyvík

LANDSVERK

INNIHALD

1.0. Inngangur 3
1.1. Verkevni 3
1.2. Galdandi lóggáva 3
1.3. Endamálið við uppskotinum 3
1.4. Málbólkur 4
1.5. Staðseting 4
1.6. Byggiánari og byggiharri 5
2.0. Skipan av byggimáli 7
2.1. Skipan undir prosjektering 7
2.2. Skipan undir bygging 8
3.0. Fortreytir 9
3.1. Lógargrundarlag 9
3.2. Verandi tekningar av øki v.m. 9
3.3. Myndugleikakrøv 9
3.4. Krøv og ynskir til byggimálið 10
3.5. Útsjónd og snið 12
3.6. Uttanumøki 12
4.0. Innrætting 13
4.1. Virksemi og bygnaður 13
4.2. Sjálvstøðugar íbúðir 13
4.3. Køkur/stova í einstøku eindunum 14
5.0. Felags 15
5.1. Felags hentleikar fyri alt sambýlið 15
5.2. Snildtøkni 15
5.3. Yvirflatur 16
5.4. Onnur atlit 16
5.5. Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað 17
6.0. Fígging og tíðarætlan 18
6.1. Fíggjarlig viðurskifti 18
6.2. Tíðarætlan 18
7.0. HTU, R&V, Gransking og Góðskutrygging 19
7.1. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU) 19
7.2. Rakstur & Viðlíkahald (R&V) 19
7.3. Prosjektering (R&V) 19
7.4. Gransking (R&V) 20
7.5. Avhendan (R&V) 21
7.6. Gransking og góðskutrygging 22
7.7. Fylgiskjøl 22

1.0. Inngangur

Funktiónsanalysa er gjørd, sum fevnir um tvey sambýli til fólk við menningartarni. Funktiónsanalysan er grundarlag undir hesi byggiskrá. Hvørt sambýlið er ætlað 18 fólkum. 36 fólkum í alt. Sambýlini verða staðsett í Tórshavn. Ætlanin er at byrja byggingina av fyrsta sambýlinum í 2018.

Sambýli eru sermerkt við sjálvstøðugum íbúðum, felagshøli og felags virksemi. Sambýli skulu rúma passandi starvsfólkaorku, eins og sambýli eisini í størri mun skulu fevna um serligar bústaðarloysnir til serstakar tørvir hjá ávísum málbólkum. Sambýli eru fyri borgarar, sum í størri mun hava tørv á at hava starvsfólk um seg allan dagin ella fólki, sum ynskja ein tættan felagsskap við onnur.

Hendan byggiskráin viðvíkur eitt av tveimum sambýlum!

1.1. Verkevni

Lógaruppskotið er liður í einari samlaðari løguætlan hjá landsstýrismanninum í almannamálum, ið umframt hetta uppskot um vardar bústaðir til fólk við menningartarni, eisini fevnir um nýtt barnaheim og búheim og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu.
Uppskotið er liður í at bøta um umstøðurnar hjá fólki, ið bera brek í Suðurstreymoy. Verandi bústaðir og bústovnar eru í ringum standi, bíðilistin til búpláss er langur, og eingi tøk pláss eru í skipanini til bráðfeingis búpláss.
Fleiri av verandi bústøðum í Tórshavn til fólk við menningartarni eru í gomlum og slitnum sethúsum, ið ikki eru hildin við líka, og sum aloftast ikki eru hóskandi til endamálið. Eirargarður er einasti vardi bústaður, sum í síni tíð varð bygdur til endamálið.
Pedagogiska eftirlitið hevur somuleiðis staðfest, at fysisku karmarnir á verandi bústøðum hava beinleiðis ávirkan á, at pedagogiska innihaldið í fleiri førum ikki er nøktandi.
Ein góður og tryggur bústaður er fyritreytin fyri inklusión, virkni og luttøku í samfelagnum. Ein góður og tryggur bústaður er grundarlagið undir sømiligari menniskjaligari tilveru, eisini hjá fólki við menningartarni.
Við hesum uppskoti kunnu fólk við menningartarni fáa hóskandi karmar um privatlív og felagslív, umframt at karmarnir styðja undir, at borgarin kann nýta sínar førleikar og gerast so sjálvbjargin sum møguligt.
Eisini vilja karmarnir styðja undir, at borgarin kann liva eitt vanligt lív, har familja og vinfólk koma á vitjan, uttan at hetta skal órógva restina av teimum, ið viðkomandi býr saman við.

1.2. Galdandi lóggáva

Eingin galdandi lóggáva er um bygging av vardum bústaði.

Heimild er í § 32 forsorgarlógini at skipa vardar bústaðir til persónar við týðandi likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndum sosialum trupulleikum, og sum tørva hjálp og stuðul til vanligt dagligt virksemi, umframt møguliga røkt.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at veita heimild til at útvega tveir vardar bústaðir í Tórshavn til fólk við menningartarni.

Verkætlanin fevnir um at byggja tvey sambýli, har hendan byggiskráin viðgerð annað. Hvørt sambýlið er ætlað 18 fólkum. Sambýlini verða ætlandi staðsett í Hoyvík.
Hvørt sambýlið kemur at fevna um tríggjar eindir við 6 búfólkum í hvørjari eind. Av hesum skulu 2 eindir fevna um sjálvstøðugar íbúðir á 40 m2. Tilknýtt hvørjari av hesum eindunum skal vera køkur/stova.

Triðja eindin skal fevna um vanligar tvey-rúms íbúðir á 50 m2 við egnari inngongd, ið liggja fyri seg sjálvan, tvs. ikki eru samanbygdar við restini av sambýlinum.
Umframt búeindirnar fevnir hvørt sambýlið um felags fasilitetir so sum starvsfólkarúm, starvsfólkaumklæðing v. baðirúmi og sansa/venjingarrúm til búfólk, reingerðarrúm og vaskirúm.

1.4. Málbólkur

Sambýlini eru ætlað fólki við menningartarni, ið hava tørv á støðugari hjáveru alt samdøgrið.

Fólk við menningartarni eru øll ymisk, eins virkisførleiki teirra er sera ymiskur og sæst hetta serliga aftur í førleikum teirra at klára seg í gerandisdegnum.
Fólk við tyngri menningartarni hava tørv á hjálp til flestu viðurskifti, eins og tey hava stóran tørv á umsorgan, røkt og tryggleika alt samdøgrið.
Fólk við lættari menningartarni hava førleikar at virka meira sjálvstøðugt í gerandisdegnum, men kunnu hava fylgisjúkur ellar sosialar avbjóðingar, ið hava við sær, at teimum tørvar meira støðuga samveru og hjálp alt samdøgrið, ella at tey hava tørv á at vera undir umsjón um náttina.

1.5. Staðseting

Sambýlini verða staðsett í Tórshavn og soleiðis, at búfólk alt eftir tørvi og førleikum sjálvi kunnu ferðast til og frá arbeiði, frítíðarvirksemi og annars nýta tær tænastur og veitingar, býurin hevur at bjóða.

Ein vardur bústaður er heim borgarans. Staðsetingin skal endurspegla hetta og skulu sambýlini tí liggja í vanligum íbúðarumhvørvi, og ikki í serligum øki ella í útjaðara.

Staðsetingin verður á samanløgdu matr.nr. 1au, 1aw og 1ax, sum í løtuni hava 2 minni sambýli, sum ikki eru tíðarhóskand og í rættiliga ringum standi. Verandi sambýlir á Mýrini skulu takast niður og burturbeinast.

1.6. Byggiánari og byggiharri

Byggiánari:

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn
amr@amr.fo

Byggiharri/ráðgevi:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
lv@lv.fo

Bygginevnd:

Hallur Thomsen, formaður
Almannaverkið
hallurt@av.fo

Kristjan Árnason
Almannamálaráðið
kristjan.arnason@amr.fo

Súsanna Nordendal
Almannamálaráðið
susanna.nordendal@amr.fo

Elsa Klein Olsen
Almannaverkið
elsao@av.fo

Verkætlanarleiðari:

Christian Djurhuus
Landsverk
chdj@lv.fo

Ráðgevi hjá bygginevnd:

Bárður í Baianstovu
Landsverk
biba@lv.fo

Yvirskipaða uppgávan hjá bygginevndini er at tryggja, at búfólk og starvsfólk fáa virðiligar karmar at búgva og virka undir, og mæla til loysnir í byggimálinum, sum eru í samsvar við hetta og ásettu yvirskipaðu karmarnar.

Bygginevndin skal hava eftirlit við, at valdar loysnir verða framdar í verki.

Arbeiðssetningurin hjá bygginevndini verður at:

- Saman við Landsverki at:
  seta upp tørv, krøv og ynskir til verkætlanina
  orða eina byggiskrá, sum skal verða grundarlag undir einum skipanaruppskoti
  arbeiða innanfyri fastlagda fíggjarkarmin
  hava eftirlit við, at skipanaruppskot og prosjekt er í samsvari við tað, sum ásett er í byggiskránni

- At tryggja fakligu góðskuna við atliti at funktiónaliteti, góðskustøði og byggilist og gera tilmæli í hesum sambandi, harundir útvega neyðugar upplýsingar / metingar frá eitt nú brúkarum og/ella øðrum serkønum.


- At viðgera møgulig broytingaruppskot, ið ávirka funktiónalitet, góðsku og byggilist, og gera tilmæli í hesum sambandi.

- At gera tilmæli til arbeiðsánaran, so hvørt sum tær einstøku fasurnar í byggitilgongdini eru loknar.

- Kunna arbeiðsánaran um øll týðandi viðurskifti, so hvørt sum arbeiðið líður.


2.0. Skipan av byggimáli

2.1. Skipan undir prosjektering



Útbjóðingarháttur:
Ráðgevingin verður boðin út alment í heildarráðgeving.
Ráðgevingin umfatar skráseting, prosjektering, HTU-samskipan, fakeftirlit.

2.2. Skipan undir bygging



Útbjóðingarháttur:
Verkætlanin verður boðin út eftir ætlan í høvuðsarbeiðstøku

3.0. Fortreytir

3.1. Lógargrundarlag

Byggiøkið er í Hoyvík í A1 øki, sum í Byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er:

"Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu."

Adressa: Á mýrini 4 og 6, Hoyvík Matr.nr.: 1au, 1aw og 1ax
Samlað stødd á grundstykkjunum er 2.883 m². Við einum byggistigið á 0,3, loyvir hetta eini bygging á knappar 865 m² grundvídd.

Víst verður til www.kortal.fo ísv. verandi tøkniligar veitingar, vatn, kloakk og frárensl í økinum.



3.2. Verandi tekningar av øki v.m.

Sí www. Kortal.fo

3.3. Myndugleikakrøv

Ráðgevi skal eftirkannað og tillaga viðløgdu tekningar til verandi umstøður á staðnum.

Møguligar skrásetingar og uppmátingar skulu vera íroknaðar tilboðnum.

Ráðgevi skal skipa fyri at, viðløgdu HTU skjøl vera arbeidd inn í verkætlanina soleiðis, at hesi eru klár hjá høvuðsarbeiðstakara at arbeiða víðari við undir bygging.

- Kommunur
- BK17
- Heilsufrøðiliga starvsstovan
- Arbeiðseftirlitið

3.4. Krøv og ynskir til byggimálið

Lendi
Atlit skulu verða tikin fyri kvalitetunum í økinum, so sum lendi og útsýni, umframt gtrannabygningum.

Parkering
Parkeringsviðurskiftini skulu verða nøktandi. Tal av parkeringsbásum sambært BK17.
Parkeringsøki háttast so at, vatn setur væl frá. Ynskiligt er at parkeringsøki eru náttúruvinarlig og í samspæli við teir lendiskvalitetir ið eru á staðnum, so sum heyggjar, grót o.a. Koyri og parkeringsøkir kunnu t.d. verða steinsett við grasarmeringsteinum ella líknandi.

Hiti:
Hita orka verður veit frá Fjarðhitafelagnum - møguliga jarðhiti ella hitapumpa.

Í bygninginum skal eisnans nýtast gólvvarmi umframt av ventilatiónsskipan skal endurnýta hitan í bygninginum.

Sanitet
Vesikummur skulu verða fríttstandandi og verða lættar at reingerða, sum lfø spiraart. Eisini skal verða lætta at reingerða runt um vesikummuna.
Vøsk vera til at heingja á veggin og skal avløb verða ført inn í veggin og niður í frárenning.
Øll sanitetsútgerð skal vera av dygdargóðum slag.
Í køkinum og vásakøkinum skulu vøskini halda krøv og treytir hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
Í øllum brúsurúmunum skal verða termostatstýrd brúsa.

Luftskifti:
Skal verða ventilatión við hitaendurvinning, ið skal góðkennast av byggiharrunum, innan prosjektera verður.
Í øllum kømrunum -og felagsrúmum, sum hava útvegg, skulu vindeygu verða til at lata upp, til tess at fáa fríska luft inn.
Mekanisk ventilatión skal vera í vesi-og baðirúmum, køkinum (roykhetta), vásakøki og vaskirúmi. Hesar mugu ikki bindast saman við øðrum ventIlatiónsverkum.
Hvørt rúm sær skal hava serstaka luftskiftisstýring. Hetta so at hvør einstakur borgari kann tillaga tempuraturin eftir egnum ynski og tørvi.

El, tele- og netskipan:
Tvær linjur skulu leggjast inn til internet. Ein til borgararnet, ið skal leggjast runt til allar íbúðirnar og eitt net til starvsfólkaøkið. Internet til starvsfólkaøkið skal kunna røkka tráðleyst runt allan bygningin.
Dygdargott og støðugt internet skal verða í øllum bygninginum.
LAN stikk skal leggjast inn í hvørja íbúð.
Tørvur er ikki á fastnettelefon.

Brunaviðurskifti:
Báðir bygningar skulu fylgja krøvunum frá brunaumsjónini og BK17. Krav verður sett fram um, at brunaávarðingarskipan skal verða í báðum bygningum, og at knýtt verður til brandstøðina í Tórshavn. Følarar á baðirúmum skulu duga at skilja millum royk og vatndamp.

Ljóðviðurskifti:
Tað er sera týdningarmikið at ljóðviðurskiftini inni í bygningunum eru nøktandi og egnað til virksemi í ávísu rúmunum. Hugsast skal um, at staðseta rúm sum kunna verða larmandi soleiðis, at hesi ikki liggja upp at rúmum har friður skal vera.
Hoyrast skal ikki millum íbúðir. Serlig atlit skulu takast so íbúðirnar eru skermaðar móti óljóði frá felagsrúmum og øðrum rúmum. Loft skulu verða ljóðdoyandi.

Ljósviðurskiftir
Allar lampur og armatur skulu stuðlan undir ein heimligan dám.
Allar lampur yvir spísiborðum í íbúðum skulu kunna dempast.
Somuleiðis í felags køki og stovu skal alt ljós kunna dempast.
Lampur skulu verða av tíllíkum slag, so at starvsfólk á sambýlinum sjálvi hava møguleika at skifta perunar.
Kring allan bygningin uttandura, skal verða nøktandi ljós, so borgarar trykt kunnu ferðast uttandura.
Allar ljós skulu verða LED.

3.5. Útsjónd og snið

Bygningar og tún skulu taka støði í meginregluni um algilt snið. Bústaðirnir skulu vera hóskandi og innbjóðandi til ein breiðan skara av fólki.

Fólk, ið hava menningartarn kunnu í størri mun enn onnur eisini hava rørslutarn, ringa sjón og ringa hoyrn. Eisini eru nøkur í málbólkinum í størri vanda fyri at fáa demens fyrri enn onnur. Atlit skal takast til hetta í innrætting og sniðgeving.

Tað er umráðandi at sambýlið fellur væl inn í nærumhvørvi, og at tað innan eins og uttan fær ein heimligan, vinaligan og innbjóðandi dám. Støði skal takast í føroyskum byggisiði - siðbundnum ella meira modernaðum, har vanlig atlit at vindi, regni, sólargangi, lendi o.s.fr. verða tikin. Bústaðirnir skulu ikki hava stovnslíknandi, stigmatiserandi eyðkeynni og skulu hava ein heimligan dám.

3.6. Uttanumøki

Hvør íbúð skal hava egið hátún ella svala við girðing, og soleiðis skipað at fólk kunnu sita skermað frá hvørjum øðrum.
Felags uttanduraøki skal skipast við havamøblum og grill, og skal leggjast eftir sólargangi, møguligum útsýni og hava lívd fyri vindi.
Týdningarmikið er, at fólk við rørslutarni kunnu ferðast frítt uttandura.
Hædd skal takast fyri veðurlagnum, eitt nú í mun til at turka klæðir innan- og uttandura. Snórar skulu tí verða yvirdekkaðir.
Pláss skal vera at goyma havamøblar, grillir og uttandura koyristólar undir taki.
Møguleiki skal vera at spula koyristólarnar uttandura áðrenn farið verður inn, og gjørligt skal vera at spula vindeyguni uttanífrá.
Hóskandi pláss skal vera til ruskbingjur, í tráð við krøv og ynskir frá ruskstøðini.

4.0. Innrætting

4.1. Virksemi og bygnaður

Á sambýlinum vera tríggjar samanbygdar búeindir/búbólkar, har 6 fólk við menningartarni fara at húsast í hvørjari eind í sjálvstøðugari íbúð. Hvør búeind er karmur um heim borgarans og skal hava sítt egna dagliga virksemi, skipað og tillagað tørvin hjá hvørjum einstakum borgara.
Búeindirnar skulu skipast soleiðis, at vit fáa væl samansettar búbólkar.
2 eindir á 6 íbúðir á 40m² skulu verða í sambýlinum, tó skal ein íbúð í hvørjari av hesum báðum eindunum verða til "illa rørslutarna", t.v.s. røktarbúfólk, og skulu hesar hava størri baðirúm við eini vendiradius á 210cm, til mobila liggilegu. (hesar verða nakað størri enn 40m²)

Allar íbúðir skulu verða skikkaðar til fólk við lættari rørslutarni, t.v.s. at hurðar verða M10 og vendiradius á vesum 150cm o.s.fr. Havast skal í huga, at her eisini koma at búgva eldri borgarar, so hugsast skal um, at ávís øki vera demensvinarliga innrættað.
Møguleiki skal eisini verða hjá øllum búeindum, at gera brúk av felagshølum.
Í felagshølunum skal rúm verða gjørt rúm fyri starvsfólkaøki. Hædd skal takast fyri, at starvafólkaøkið ikki kemur at órógva dagliga virksemi borgarans.

4.2. Sjálvstøðugar íbúðir

Hvørt búfólk skal hava egna sjálvstøðuga íbúð.

Íbúðin skal vera løtt at innrætta og fáa hugna og huglag í. Rúmini skulu verða rættvinklað, og gjørligt skal verða hjá búfólki at seta sín egna dám á innrættingina.

Hvør íbúð skal fevna um dur við plássi til jakkar og skógvar, tó undantikið íbúðirnar til fólk við serliga ringum rørslutarni.

Hvør íbúð skal hava ein lítlan køk við køliskápi, roykhettu, ovni og kókiplátum. Er hetta ikki ráðiligt í mun til einstaka búfólkið, skal pláss setast av til køkin og installatiónir leggjast inn, soleiðis at næsti borgarin, ið flytir inn kann fáa neyðugu hentleikarnar.

Møguleiki skal altíð vera at sløkkja fyri el og vatni í køkinum í einstøku íbúðunum – hetta av trygdarávum.

Allar íbúðirnar, bæði tær á 40 m2 og 50 m2 skulu hava egið uttanumøki við hurð út til umgyrda terrassu ella altan, og har búfólk kunnu halda til, avbyrgd hvør frá øðrum og við møguleika fyri lívd frá vindi.

Fólk við menningartarni kunnu vera sera ymisk á vøkstri og skulu skáp tí ikki vera høgt uppi.
40m² íbúðir, 2 x 6 íbúðir
Íbúðirnar á 40m² skulu verða einrúms íbúðir, har skipað verður fyri soviplássi verður í uppihaldsrúminum, sum verður alrúm køkur/stova. Tað skal verða gjørligt, ómakaleyst at montera skinnaraskipan í øllum íbúðum. Samband skal vera ímillum rúmini soleiðis, at beinleiðis skinnaraskipan ímillum song og baðirúm kann setast upp. Íbúðin til rørslutarna skal hava skinnaraskipan, har man kann koyra frá song til wc í beinari linju. Møguleiki skal verða at seta seingina soleiðis, at borgarin kann verða hjálptur frá báðum síðum.

Pláss skal verða fyri fólki, ið sita í vanligum koyristóli.

Skápspláss skal verða til klæðir, eins og skápspláss skal verða til dustsúgvara og vaskiútgerð.
Pláss skal verða til reol, vitrinuskáp e.l.

Baðirúmið í íbúðunum skal innrættast sambært krøvum til baðirúm til fólk við rørslutarni. Brúsan skal kunna regulerast í hæddini í øllum íbúðum. Tó skal eitt baðirúm í hvørjari eind hava vendiradius til liggilegu, t.v.s. 210cm.

Á baðirúminum skal pláss vera til handkløð, sápur, krem o.l., umframt hondsápu, spritt, skrellispann og kurv til skitin klæði.

Innbygt spegl í fullari hædd skal vera inni í øllum baðirúmum, hetta til tess at økja likamstilvitanina. Í íbúðunum til illa rørslutarnað, skal breiddin vera so mikið breið, at fólk, ið liggja vatnrætt eisini kunnu síggja seg í fullari stødd.

Á baðirúmunum skal pláss setast av og innleggingar gerast klárar til eina vaskimaskinu og turkitrumlu soleiðis, at búfólk kunnu velja at keypa sær hesar.

Pláss skal verða til Smart TV í øllum íbúðum.

50m² íbúðir, sjálvstøðug eind á 6 íbúðir
Íbúðirnar á 50 m2 skulu hava egna inngongd frá vegnum. Her er talan um vanligar 2 rúms íbúðir í algildum sniði. Íbúðirnar skulu fevna um inngongd/dur, køk/stovu og baðirúm. Íbúðirnar skulu vera í einari hædd og ikki hava hems e.l. til uppihald. Tó kann hems gerast til goymslupláss.
Skulu annars lúka krøv og ynskir, sum lýst í teiginum um 40m² íbúðirnar.

4.3. Køkur/stova í einstøku eindunum

Búeindirnar í sambýlinum skulu hava fult útgjørdar køkar við spísiplássi til 10 - 12 fólk. Búeindin við sjálvstøðugu íbúðunum, skal ikki hava køk ella felagsøki, men tað skal verða pláss fyri, at búfólk í sjálvstøðugu íbúðunum kunnu velja at eta á sambýlinum.

Køkurin í aðrari av eindunum skal vera góðkendur av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni til at gera mat til øll 24 búfólk og starvsfólk. Tað vil siga at annar køkurin vera skal gjørdur til 10-12 fólk, meðan hin er til 24 fólk.

Knýtt at køkinum í báðu eindunum skal vera uppihaldspláss við sjónvarpi og bleytum møblum. Køkurin skal verða eitt savnandi rúm í eindunum.

5.0. Felags

5.1. Felags hentleikar fyri alt sambýlið

Sambýlið skal hava innbjóðandi og fjálga inngongd. Búfólk og vitjandi skulu kenna seg vælkomin, og hava eina kenslu at koma inn í eitt heim, heldur enn eitt arbeiðspláss.

Felags fyri alt sambýlið skal vera:

- Afturat køkinum skal vera grovkøkur og matarkovi. Møguleiki skal vera at keypa stórt inn og at goyma mat kaldan. Pláss skal vera fyri frystiboks. Hetta kann liggja saman við góðkenda køkinum.
- Starvsfólkarúm við lítlum køki við pláss fyri 12 persónum umframt plássi til skráseting (2 teldum), bleytum møblum og fundarborði til 10 fólk. Pláss skal vera til talvu og stórskíggja.
- Pláss skal vera í starvsfólkarúminum til at varðveita og køla heilivág.
- Starvsfólkaumklæðing og baðirúm. Starvsfólkaumklæðing skal innrættast við benkrum e.l. sum fráleggingarstað. Umklæðingarrúmið skal hava skáp (lockers) til 20 fólk. Baðirúm skal innrættast sum eitt vanligt vesi við brúsu og øllum vanligum hentleikum.
- Goymslurúm á minst 20 m². Hjálpartól sum vera nýtt av og á skulu kunna stillast í hesa goymslu. Hillar skulu setast upp á veggir.
- Sansa/venjingarrúm á uml. 30 m². Rúmið má hava fleiri stikkkontaktir og má kunna myrkaleggjast heilt. Ikki við stór vindeygu)
- Búfólk skulu hava goymslukliva til kuffert, jólapynt, sólstólar o.l.
- Reingeraðarrúm við vaski og krana. Pláss skal vera fyri reingerðarvogni og reingerðarvørum.
- Vaskirúm við tveimum vaskimaskinum og 2 turkitrumlum, stórum vaski og borðplássi til at leggja klæðir saman.
- Reingerðarrúm og vaskirúm kunnu leggjast saman fyri at spara fermetrar.
- Tøknirúm

5.2. Snildtøkni

Kallitól skulu vera frá øllum baðirúmum.

Lan net skal leggjast í øll rúm.

Trygdar- ella ávaringarskipanir (alarmar), samskiftistøkni, "omgivelseskontrol" og tílík útgerð, ið er alneyðug fyri trygdina hjá einstaka borgaranum skal leggjast við káplum.
Hvør onnur útgerð enn tann, ið her er nevnd verður avtalað við bygginevndina.

Onnur snildtøkni, sum ikki er at meta sum trygdar- ella ávaringarskipanir kann vera tráðleys, eitt nú ljós- og hitastýring. Hetta verður somuleiðis nærri avtalað við bygginevndina.

5.3. Yvirflatur

Í vátrúmum skal vera slætt vátrúmsloft.

Í øðrum rúmum skal vera ljóðregulerandi loft.

Tilfar til gólv, útsíður, innveggir og litir verða ásett í samstarvi við bygginevndina.

Litir í íbúðum og felagshølum skulu verða heitir, skynsamir og vinaligir.

Máling, ið ikki kann málast útyvir skal ikki nýtast.

Borgarin skal avgera møguligar litir í privatu íbúðini.

Búfólk skulu kunna seta sín egna dám á felagshølini.

5.4. Onnur atlit

Byggitekniskar loysnir, ið góðar royndir eru við í Føroyum skulu nýtast, eins og tilfar, ið er kent og sum góðar royndir eru við, skal nýtast.

Góðir og hóskandi, vælvirkandi, funktionellir og haldgóðir karmar innandura skulu verða valdir.

Loft og veggir skulu dimensionerast soleiðis at skinnaraskipanir kunnu setast upp eftir tørvi.

Pláss skal vera fyri at búfólk kunnu hava rørslutarn. Vendiradius í øllum rúmum skal svara til støddina á vanligum koyristólum, ið bygningurin er ætlaður til. Tó skal íbúðin til tyngri røktartørv taka hædd fyri størri hjálpartólum.
Møgulig gongsøki skulu dimensionerast soleiðis, at tveir vanligir koyristólar kunnu møtast.
Tað er umráðandi, at tað ikki hoyrist ímillum einstøku búeindirnar í tí dagliga. Eindirnar skulu ikki liggja upp ímóti hvørjari aðrari.

Starvsfólkarúm skal liggja miðskeiðis í bygninginum. Møguliga í millumbygningi fyri at skilja eindirnar sundur.

Sambýlið skal helst byggjast í einari hædd. Verður neyðugt at byggja í fleiri hæddum, skal lyfta verða í sambýlinum.

Verða búeindirnar lagdar í ymiskum hæddum, skal umframt áður lýsta starvsfólkarúm eisini minni starvsfólkarúm verða á somu hæddini sum búeindin. Rúmið skal fevna um pláss til skráseting, sofu og lítlan tekøk, eins og pláss skal vera til talvu og stórskíggja. Eisini skal lítið reingerðarrúm verða hesi á hæddini.

Starvsfólk skulu ikki ferðast ígjøgnum felags uppihaldsrúm fyri at koma til starvsfólkarúmið.

Borgarin skal ikki ferðast ígjøgnum felagshølini ella starvsfólkarúmið fyri at koma inn í egna íbúð.

Tráðleyst samband skal vera í øllum húsinum. Møguleiki skal vera at sløkkja internetið hjá einstaka borgaranum eftir tørvi.

Møguligir ivaspurningar og serligar avgerðir skulu takast upp við bygginevndina.

Hvørt búfólk skal hava egnan postkassa

Hvørt búfólk skal hava ringiklokku við sambandi til egna íbúð.

5.5. Krøv og ynski til innbúgv og útbúnað

Serstakt útboð verður til leyst innbúgv.

6.0. Fígging og tíðarætlan

6.1. Fíggjarlig viðurskifti

Talan er um nýggjan bygning á áleið 1.100 m² nýtsluvídd í óbygdum øki/í øki har 2 bygningar standa frammanundan.
Handverkaraútreiðslur(HVÚ) til verkætlanina er 18 mió.kr.
Hartil er avsett 1,25 mió.kr. til innbúgv, útgerð og tól og kr. 300.000,- til niðurtøku av verðandi bygningum.

6.2. Tíðarætlan

Víst verður til Fylgiskjal Útboðstíðarætlan – Mýran dagf. 26.09.2018

7.0. HTU, R&V, Gransking og Góðskutrygging

7.1. Heilsa, Trygd og Umhvørvi (HTU)

HTU skal verða ein týðandi partur av verkætlanini í prosjektering, útinning, rakstri og viðlíkahaldi, og starvsfólk skulu hava eitt gott arbeiðsumhvørvi bæði í tilgongdini til verkætlanina, undir bygging og tá bygningurin er tikin í nýtslu.

Skyldur javnført ásetingunum í arbeiðsumhvørvislóggávuni og umhvørvislóggávuni skulu fylgjast.

Tryggjast skal, at ásetingarnar í "*Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 1017 af 15. december 1993 om indretning af byggepladser og lignende arbejdssteder efter lov om arbejdsmiljø"*, ið er sett í gildi fyri Føroyar við "*kunngerð nr. 136 frá 4. september 1995 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss"* við fylgiskjølum, verða fylgdar. Listi yvir loysnir innan arbeiðsumhvørvis viðurskifti, sum eru út yvir tað vanliga, skal gerast.

Ráðgevi skal tryggja í prosjektering, at byggiarbeiðið í mest møguligan mun verður framt í vanligari arbeiðstíð, tó kann henda, at neyðugt verður at skipa nakað av byggiarbeiðinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Skipað samstarv skal verða millum byggifeløg, byggileiðslu, fakeftirlitið og starvsfólk, harundir byggifundir, sum meginregla verða hildnir hvørja ella aðruhvørja viku. Trygdarrunda og fundir verða sum meginregla hildnir 4. hvønn dag.

Tryggjast skal, at byggiarbeiðið verður lagt soleiðis til rættis, at tað sum heild verður til minst møguligan ampa fyri kringumstøðurnar. Arbeiðið skal skipast soleiðis, at tað elvir til minst møguligt óljóð, dálking og ferðslu í umhvørvinum. Fyribils ávísingar og vegleiðandi skelti skulu setast upp í samstarvi við byggiharran og avvarðandi kommunu.

HTU-ætlanin hjá Landsverki skal takast við í felagstreytunum. Sí fylgiskjal HTU-ætlan 30102018. Tilfar og upplýsingar til HTU-ætlanina frá ráðgeva og arbeiðstakara skal latast tí, sum vegna byggiharra er HTU-samskipari (trygdar-/arbeiðsumhvørvissamskipari).

7.2. Rakstur & Viðlíkahald (R&V)

Endamálið við rakstrar- & viðlíkahaldsætlanini, R&V, er at tryggja eitt framhaldandi, nøktandi R&V. R&V skal leggjast til rættis og passast til raksturin av bygninginum annars. Í samljóði við funktiónskrøvini í byggiskránni, skal viðlíkahaldsstøðið verða viðvirkandi til at røkka dygdar- og haldgóða bygging:

Byggiharri krevur í hesari verkætlan talgilda avhending. Tað er galdandi fyri allar upplýsingar, sum kunnu hava ávirkan á framtíðar rakstrarskeiðið. Treytirnar eru galdandi fyri allar arbeiðstakarar í verkætlanini.

Í hesum stykki eru yvirskipað krøv lýst, við tí endamáli at halda funktionella og fíggjarliga virðið í bygningi og fríøkjum, herundir byggilist, -tøkni og dygd.

7.3. Prosjektering (R&V)

Bygningurin skal sniðgevast og gerast, soleiðis at R&V av bygninginum verður skynsamt. Allir byggilutir skulu framleiðast smb. galdandi og dagførdum vegleiðingum frá viðurkendum stovni/virki/framleiðara. Val av tilfari og loysnum skal eggja til skynsaman R&V og tryggja:

- Eitt optimalt inniklima, uttan ampar.
- Ein tættan og byggitøkniliga rætt útførdan klimaskerm.
- Góðar og tryggar umstøður fyri brúkarar og gestir í bygningi og útiøkjum.
- Vælvirkandi og orkurættar tøknuligar innleggingar.
- Byggitøkniliga rættar loysnir.
- Góðar atkomiligar loysnir.
- Orkurættar loysnir.

Allir lutir, ið krevja reingerð, ansing og røkt, skulu verða lætt atkomuligir og skulu verða staðsettir soleiðis, at arbeiðið at reinsa, ansa, umvæla og røkja lutirnar/skipanirnar er trygt og nøktandi, herundir:

- Luftskiftisrør og rør í síni heild skulu verða staðsett so, at tað er møguligt at reinsa og røkja skipanina.
- Eftirlitslúkur herundir KT, El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Talvir og skýggjar fyri KT, El-, HVS-, Ventilatión-, v.m.
- Lyftiútgerð
- Brunaútgerð
- Atkomueftirlit
- Allar tøkniligar lutir v.m.

7.4. Gransking (R&V)

Valdar loysnir skulu granskast og verkætlanartilfarið skal góðskutryggjast viðvíkjandi rakstri og viðlíkahaldi fyri allar fasur í prosjekteringini. Gransking skal sum minsta mark fevna um:

- Byggibæri
- Byggitøkni
- Orkurætt
- Inniklima
- Atkoma
- Fólkatrygd
- Reingerð
- Viðlíkahald
- Rakstur
- Kostnað av teim oman fyri nevndu

Góðskutrygging skal sum minsta mark fevna um:

- Nøktandi støði á verkætlanartilfari
- Eintýtt verkætlanartilfar
- Kollisiónsgreining millum fakbólkar
- Greið og fullfíggjað markamót
- Samsvar millum tekningar
- Samsvar millum skjøl
- Tíðarætlan
- Kostnaðarætlan

7.5. Avhendan (R&V)

Verkætlanin skal prosjekterast í Revit, og hava ráðgevar til uppgávu at lata byggiharranum allar tekningar "sum bygt" av bygninginum eftir nærri avtalu við byggiharran og IKT avtalu.

R&V deild byggiharrans, treytar sær fullan nýtslurætt tekningar og annað tilfar, sum latið inn smb. IKT avtalu. Nýtslurætturin er tó bert galdandi fyri verkætlan tekninagar/skjøl er virka til. Øll viðkomandi skjøl skulu veitast í forsniði, sum greitt frá í IKT avtalu.

Harumframt hava ráðgevar og arbeiðstakarar ábyrgdina av, at øll **R**akstrar-, **E**ftirlits- og **V**egleiðingarskjøl (**REV**) verða latin byggiharranum.

Skjøl sum skulu veitast eru:

- Vegleiðingar fyri REV:
  - Upplýsingar um allar byggilutir, elementir, komponentar og skipanir, herundir, veitari, nágreining, merki, typa v.m.
  - Reingerðarháttur & -evnir
  - Viðlíkahalds- & umvælingarvegleiðingar, herundir úrtskifting av byggilutum, elementum, komponentum og skipanum.
  - Evt. kunnan, upplæring og skeið.

- Viðlíkahaldsætlan
  - 10 ára viðlíkahaldsætlan skal veitast

- Ætlan um rakstrarkostnað
  - Skjøl um væntaðan kostnað av rakstri, veiting, orkunýtslu og reingerð
  - Meting um rakstrarkostnað skal gerast fyri 10 ára skeið, við kostnaðarstøði frá avhendingardegi.

- Garantiskjøl
  - Allar givnar ábyrgdir/trygdir, herundir einkultvøra og samansettir byggilutir, skulu latast til byggiharra við avhendan.

- Dátubløð
  - Rakstrarviðkomandi vørufrágreiðingar, serliga veitarans vørublað.

- Byggilutakort og sermyndir av samanbyggingum
  - Veruligir upplýsingar um byggilutir og komponentar, og herundir rakstrar- og viðlíkahaldsupplýsingar.

- Innregulerings-, máti- og royndarfrágreiðingar
  - Innregulering-, máti- og royndarfrágreiðingar, sum eru gjørdar, tá ið farið verður í gongd við verkløg.

- "Sum bygt" tekningar og diagramm
  - Allar tekningar og diagramm, sum nýtt eru í sambandi við bygging, uppseting, og tá ið farið verður í gongd við bygningar og verkløg.
  - Avtaluseðlar og skitsur.

- "Sum bygt" myndir

- Allar myndir frá byggibyrjan til avhending
- Myndir frá eftirlitinum
- Myndir frá arbeiðstakara / veitara
- Myndir frá byggileiðslu

7.6. Gransking og góðskutrygging

Ein góð gransking av eini verkætlan, er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti. Gransking skal verða framd, meðan prosjekteringin er ávegis. Somuleiðis skal granskingin fylgja byggingini og veiting av byggieindum.

Gransking fevnir um innanhýsis gransking og tvørfakliga gransking. Byggiharrin varðar av gransking av øllum fasum. Tó frítekur hetta ikki ráðgeva at hava interna gransking, sambært sáttmála. Alt framleitt tilfar skal veitast byggiharra og uttanhýsis granskarum í uppruna forritum so sum Revit, Word e.l fyri hvørt granskingarstig. Hetta er galdandi fyri byggiharra, byggiharraráðgeva og allar teir prosjekterandi partarnar fyri øll fak.

Minstamark fyri ráðgevaragransking eru ásetingarnar í "Ydelsesbeskrivelser 2012 – For Byggeri og Planlægning" kap. 3.
Fyri hvørt stig í prosjekteringini skal gransking fremjast og frágreiðing latast byggiharranum. Farast skal ikki undir næsta stig, fyrr enn góðkenning av undanfarna stigi fyriliggur frá byggiharra, og viðmerkingar eru arbeiddar inn í undanfarna stig.

7.7. Fylgiskjøl

Útboðstíðarætlan – Mýran 26.09.2018
Trú og heiður váttan
Tillæg til Ydelsesbeskrivelser Byggeri og planlægning 2012_Kap.8.4
Som udført februar 2000
Ydelsesberskrivelse 2012 við ískoytum, frávikum, neyvlýsingum v.m.
Tilboðsbræv nov. 2018
Útbjóðingarskriv dagf. 31.okt. 2018
Ráðgevarasáttmáli(verður sendur út seinni)
Hendan byggiskráðin dagf. Feb. 2018

HTU – Skjøl
Fylgiskjal 1 – Bygnaður trygdarskipan
Fylgiskjal 2 – Tíðarætlan
Fylgiskjal 3 – Byggiplásstekning
Fylgiskjal 4 – Serliga vandamikið arbeiðið og serligir vandar
Fylgiskjal 5 – Avmarkan av trygdartiltøkum á felagsøkjum
Fylgiskjal 6 – Trygdarfundir
Fylgiskjal 7 – Trygdarrunda
Fylgiskjal 8 – Byrjanarfundir
Fylgiskjal 9 Tilbúgving
HTU-ætlan 30102018



Tinghúsvegur 5 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

LANDSVERK